Hann mundi vera millum teir fyrstu føroyingar, ið royndu á Kolmúlagrunninum. Ein franskmaður, Poul Johannes kendi, hevði merkt honum grunnin av á kortinum og hevði biðið hann um at royna har. Tað var um miðjan september 1901, at teir kastaðu á Kolmúlagrunninum, og fyrsta dagin høvdu teir 1.800 fiskar á dekkinum.

Gamli skipari var annars eisini við Acorn tann vanlukkuliga túrin í 1928, tá ið eldur kom í í lugarinum orsakað av karbiddunkum, sum sjógvur kom at. Sjey mans brendu tá í hel. Henda hending er fyrr umrødd í Miðvikuni.

Teir fiskaðu 60 skippund undir Føroyum. Síðan fóru teir til Íslands, har teir royndu á leiðunum, sum franskmenninir høvdu víst teimum á. Teir fingu einar 300 kr. fyri árið.

## Brúdleyp á Hvítanesi

Í 1904 var eitt ordiligt knall á Hvítanesi. Tað vóru tvey brúdleyp í bygdini samstundis. Annað parið hevur helst verið Christian Djurhuus av Selatrað, sum giftist við Jovinu Nybo, abbadóttir Skora Poul, sum fyrr er umrøddur í røðini Hendur ið Sleptu.

Hini vóru Martin Joensen, sum giftist við Ingeborg, ættað úr Suðuroy. Tað komu nógvir gestir. Teir, sum komu úr Suðuroy, vóru fleiri dagar um ferðina. Dánjal mintist, at tey, sum komu dagin fyri, fingu seyðarhøvd til døgurða.

Millum gestirnar var Hest Jóannes og konan. Jóannes kom til Dánjal og spurdi um hann ikki vildi koma við sær til skips. Hann segði, at prísirnir vóru betri har suðuri. Teir góvu 3 oyru meira fyri banktosk, 2 oyra meira fyri annan føroyskan tosk og 1 oyra meira fyri íslandstosk.

Jóannes í Hesti, Johannes Pauli Johannesen, var føddur í Hesti í 1867. 16 ára gamal fór hann til Nólsoyar at læra bátasmíð hjá Johan í Garði. Tvey ár seinni fór hann at fiska saman við hetlendingum. Hann var við ymiskum skipum, fór uppá skúla og í 1903 fær hann Carl at føra. Hann var ein av slóðbrótarnum fyri føroyskum sluppfiskiskapi undir Íslandi. Tað verður sagt í Føroya Siglingarsøgu, at tað eigur ikki at vera gloymt, at tað vóru Palla á Mýruni og Jóannes í Hesti fyri at takka, at føroyingar aftur fóru at fiska á Suðurlandinum, har teir ikki høvdu roynt síðan í 1880-unum. Hetta teirra slóðbrótarastarv kom at fáa stóran týdning, tí Suðurlandið gav í mong ár nógvar ferðir meira av sær enn várfiskiskapurin undir Føroyum. Jóannes førdi Carl til 1914.

Dánjal helt tað vera áhugavert at fara til Suðuroyar, har hann ikki hevði verið fyrr, og hann fekk fría reisu suður. Soleiðis kom hann umborð á Carl við Hest Jóannes sum skipara, og teir fóru á Suðurlandið, hóast tað ikki var loyvt at fiska har, tí tað var mett at vera so vandamikið. Franskmenn vóru illa royndir á hesum leiðum, og nógv skip gingu burtur. Franskmenn høvdu enntá egnan kirkjugarð í Íslandi.

Tað komu so ofta franskmenn til Føroya av skipum, ið vóru farin. Teir gistu á Hotel Djurhuus, vertshúsinum, til teir sluppu víðari.

Carl bleiv eisini nógv tarnað av ringum veðri. Teir fingu 112 skippund á Suðurlandinum. Síðani fiskaðu teir 100 skp. á bankanum og 70 skp. á Nólsoyar Banka.



*Dánjal var fyrsta túrin við Lalla Rookh*



*Dánjal var eisini við Grana*

## Sluppu í drangin fyri keksatunnu

Í 1905 fóru teir aftur á Suðurlandið. Tað viðraði illa, men teir fóru so upp á Norðurvesturlandið. Har var ein drangur við nógvum fugli. Teir koyrdu eina keksatunnu í bátin og spurdu bóndan, um hann vildi loyva teimum at fara í drangin afturfyri. Tað var gaman í. Bóndin setti á keksatunnuna beinanvegin, og skiparin helt, at Dánjal skuldu klúgva upp á drangin. Hann var lágur av vøkstri, lættur og kimiligur. Ein mastur bleiv sett upp at dranginum. Dánjal hevði eina klæna lissu á sær, og hann kom so høgt upp sum masturin røkk. "Tú má fara longur upp," rópti skiparin. Hann royndi so at fáa sær fótafesti og toga seg upp eftir, til hann kom á eina hyll, har fleiri kundu sita. So dróg hann ta sveraru línuna upp, so fleiri menn kundu koma upp á hyllina, har tað var gott pláss. Teir fingu eina rúgvu av eggum og nógvan lomviga. Maðurin sum fór niður á rókina kallaðist Gutti í Skálanum, ein sandingur. Seinni fekk Gutti arbeiði hjá einum reiðara í Aberdeen. Hann hevði føroyska konu, og tey búsettust har.

## Maðurin umborð

Dagin eftir fingu teir fugl til døgurða og bollasuppa. Tað smakkaði! Teir fingu eisini tveir kópar. Skiparin saltaði sær spikið av teimum niður í eina tunnu.

Dánjal minnist eina náttina, at Jákup í Katrinastovu purraði seg út. Hann hevði kókað ræstan fisk og tikið eitt petti av spiki úr tunnuni hjá skiparanum. Teir skuldu á vakt. Tá sær hann, at í eini koyggju, har sjóklæði lógu, liggur ein maður og svevur. Hann heldur tað vera onkran av manningini, ið hevði lagt seg har.

Teir settust so at fáa sær og góvu sær góðar stundir. Spikið smakkaði teimum avbera væl. Tá ið teir høvdu ruddað av aftur, fór Dánjal at vakja hendan mannin. Hann ætlaði at bjóða honum avlopið. Tá var eingin maður har. Fleiri søgdu seg hava sæð hendan duldarfulla mannin, ið segðist einaferð av onkrari orsøk at vera deyður umborð.

Hest Jóannes var ikki blíður morgunin eftir, tá ið hann sá, at onkur hevði verið í spiktunnuni.

Hetta summarið landaðu teir til farmaskipið Føroyingur. Teir fiskaðu við Mánaoyggjarnar og



*Jóannes í Hesti bað Dánjal koma við sær, tá ið hann var á Hvítanesi í brúdleypi*



*Poul J. Joensen, "Gamla skipara" frá Gjógv, sigldi Dánjal eisini við*

við Grimsoynna. Kokkurin var farin heim, og teir fingu nýggjan kokk, ið var ógvuliga dugnaligur. Hann mjølvaði fiskin, steikti og brasaði leyk til. Hetta vóru teir ikki vanir við. Leyklukturin fór um alt skipið og kendust væl heilt yvir á Føroyingin.

Í oktober sigldu teir heim og fingu eina ringa heimreisu. Teir máttu brúka fleiri lýsiføt at slætta sjógvin. Tað bleiv av ringasta veðri av útnyrðingi. Hetta var ein óhugnalig sigling. Teir repaðu seglini, meðan teir sigldu undan. Teir fingu ein so stóran sjógv, at sluppin lá heilt sløtt í sjónum. Seglið skrædnaði, og tá reisti hon seg aftur. Út fyri Skarðsgjógv á Fugloynni løgdu teir bakk. Tá ið veðrið umsíðir batnaði eitt sindur, sigldu teir suður á Tvøroyri. Teir høvdu fiskað 570 skippund, og tað gav 570 kr. fyri árið.

## Mundu gingið burtur við Oliviu

Í 1906 hevði Poul á Hvítanesi fingið Livingstone hjá Wilhelm Mohr at føra. Dánjal og hann vóru systkinabørn. Poul flutti seinni út í Hest. Dánjal fór við honum, men hetta var ikki nakað gott fiskiár. Ein dagin fingu teir ein veldiga stóran kalva. Teir